


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Tí vil borgarstjórin á ting!



Val

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu og valevni Javnaðarfloksins

Fleiri kanska undrast á, hví tað er so umráðandi hjá borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu at verða valdur í løgtingið, tá hann nú frammanundan hevur stóra politiska ávirkan sum borgarstjóri í landsins høvuðsstaði og nógv størstu kommunu.

Jú, sjálvandi gevur tað stóra politiska ávirkan at sita sum borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, men tað nyttar bara so lítið, tá tey mest sjálvsøgdu málini hjá høvuðsstaðarkommuni ikki kunnu verða loyst uttan beinleiðis ávirkan á løgting og landsstýri.

Óteljandi dømi eru um, at mál hjá kommununi bert koma fram at loysnini, men ikki kunnu verða loyst, uttan at løgtingið og landsstýrið gera sín part. Tí bjóði eg meg fram um valevni til løgtingið og biði allar góðar kreftir um at geva mær neyðuga stuðulin til tað.

Um vit bara taka eldraøkið, so hevur Tórshavnar kommuna útbygt Tjarnargarð við 24 røktarheimsplássum, men uttan beinavegin at fáa tann neyðuga stuðulin frá landinum, ið annars er ein sjálvfylgja, tá stig verða tikin á eldraøkinum alla aðrastaðni í landinum.

Tað sama ger seg galdandi við Tilhaldinum í Havn, har landið hevur forsømt sína náttúrligu skyldur í ríkiligt mát – eins og tað hevur tað yvir fyri hinum tilhaldunum kring landið. Tilhaldið í Havn var tað fyrsta, og síðani eru tíbetur komin fleiri kring landið, men landsins játtan er ikki vaksin tilsvarandi, og er – so løgið tað ljóðar – minni í part til tilhaldini, so hvørt sum frambrot annars verða framd!

Til allarsíðst má eg nevna tørvin hjá okkara eldru at sleppa at røra seg og fáa venjing, ið bæði kann hjálpa teimum í gongd av nýggjum, hava tey onkursvegna fingið skerdan førleika, men so sanniliga eisini kann vera fyribyrgjandi, so tey væl og virðiliga kunnu halda sín førleika við líka.

Her høvdu vit saman við landinum eina góða roynd-arskipan á Tjarnargarði, har kommunan skapti karmar og útvegaði amboð, so 70 fólk kundu fáa venjing og vegleiðing frá fysioterapeuti. Men av tí at landið hevur strikað játtanina, er hetta arbeiðið tíðverri steðgað upp á nýggjárinum!

Umframt alt hetta, ið eg her havi nevnt, arbeiða vit við at útbyggja á Boðanesi, so vit har fáa ein heilan býarpart fyri tey eldru, sum verður gjørdur í fleiri stigum. Talan er í fyrsta umfari um røktarheim, ellisheim og at enda eisini um eldraíbúðir. Her er brúk fyri uppbakking frá landsins myndugleikum, sum jú eiga eldraøkið, men tað tykist bara vera so smátt við tí, tá talan er um Suðurstreymoy.

Hetta er tann stóra orsøkin til, at eg sum borgarstjóri í Tórshavnar kommunu ynski at fáa stuðul frá tykkum veljarum, so øll hesi stóru og týðandi mál fyri eldraøkið kunnu koma ígjøgnum. Við einari rødd á tingi kann eg beinleiðis vera við til at ávirka, so tiltrongdu broytingarnar verða framdar.

Í eini tíð, har tað annars gongur við rúkandi ferð í hesum landi, ber ikki til, at løgting og landsstýri ikki duga at finna neyðugu pengarnar, tá tað kemur til okkara eldru og teirra vælveru. Í nógvum førum er talan um smáar upphæddir, ið kunnu gera stórt gagn, men onkur má skunda undir og fáa sett meira ferð á. Tað eri eg til reiðar at gera, fái eg tykkara álit so eg vinni sess á tingi 19. januar!

www.hedinmortensen.com

# Suðuroy og Sandoy í serstøðu



Val

JASPUR VANG
Løgtingsvalevni Sambandsflokksins í Suðuroy

Meðan nógv verður tosað um sosialt samhaldsfesti, nú vit fyrstu ferð velja til eitt valdømi, verður ikki so nógv tosað um landafrøðiligt samhaldsfesti. Her má broyting koma í.

Vit mugu skapa liviligar umstøður og fortreytir fyri vøkstri og virðisøking kring alt landið. Bert á tann hátt kunnu vit til fulnar gagnnýta alt okkara náttúrugivna - og menniskjaliga tilfeingi og halda uppi tí mentunarliga -, sosiala - og vinnuliga fjølbroytni, sum er neyðugt í einum heilskaptum samfelag.

**Skeiv gongd í Suðuroy og Sandoy**

Hyggja vit at hagtølunum, kunnu vit staðfesta, at árini 1985 – 2007 vaks fólkatalið í Føroyum uml. 7 %. Í Streymoynni var vøksturin uml. 17 %. Í Suðuroynni og Sandoynni fall fólkatalið í sama tíðarskeiði við uml. 17 %. Nevnast kann, at fólkatalið í Suðuroynni í dag, er tað sama sum fyrst í 1920-unum.

Umframt fallandi fólkatalið, er aldursbýtið og kynsbýtið í báðum økjunum avlagað. Harvið er ein sera óheppin ringrás byrjað.

Ein og hvør dugir at síggja, at gongdin í Suðuroynni og Sandoynni ber tann skeiva vegin, og at okkurt má og skal gerast.

**Ein íløga í framtíðina**

Fyri fáum árum síðani varð gjørd ein kanning av peningarenslinum millum Suðuroynna og almennu Føroyar. Kanningin vísti, at almennu Føroyar hava eitt yvirskot av Suðuroynni uppá uml. 70 milli-ónir krónur árliga.

Kanningin sigur okkum, at hóast stóra afturgongd, letur Suðuroy framvegis eitt munandi íkast til føroyska landshúsarhaldið. Íløgur í Suðuroynna eru soleiðis ein íløga í framtíðar Føroyar, meira enn ein útreiðsla.

**Vakstraravtala fyri Suðuroynna neyðug**

Fyrst í nú skjótt farna valskeiði varð farið undir arbeiðið við einari vakstraravtalu fyri Suðuroynna. Slíkar avtalur eru vanlig amboð í londunum kring um okkum. Nevnast kann, at m.a. finska risafyri-tøkan "Nokia" er úrslit av einari slíkari - hóast alt munandi størri - vakstraravtalu.

Komunurnar í Suðuroynni eru til reiðar. Landspolitiski myndugleikin hevur tó verið ógvuliga seinur í vendingini.

Í komandi valskeiði eigur tí sum skjótast at verða farið undir hesa verkætlan, sum kann gerðast ein fyrimynd fyri onnur økir í landinum við.

**Fast Suðuroyarsamband**

Nú Sandoy komandi verður bundið í meginøkið, gerðast sandoyingar partur av meginøkinum og kunnu á jøvnum føti verða við til at menna føroyska samfelagið, eins og Sandoy við fasta samband-inum gerst eitt alternativt bústaðarøkið. Land okkara er harvið vorðið størri og sterkari.

Eftir eru so 10 % av føroyska fólkinum, nevniliga suðuroyingar, umframt smærru oyggjarnar.

Havandi í huga tær uml. 100 milliónir krónurnar núverandi farleiðin um Suðuroyarfjørð kostar í rakstarútreiðslum árliga og við tí veruleika fyri eygað, at vit um eini 20 – 30 ár skulu gera íløgu í nýggjan Smyril, sum til tað tíð kanska kostar ta tvífalda av núverandi Smyrli, t.v.s. ein knappa milliard krónur, er lítil ivi um, at vit eiga at fara undir forkanningar og fyrireikingar av føstum Suðuroyarsambandi.

Meðan forkanningar og fyrireikingar verða gjørdar og ætlanin framd í verki, eigur sjálvsagt at verða siglt millum Tvøroyri og Tórshavn. At gera íløgur í havnalag í Hvalba og á Sandi og síðani sigla um Hvalbiarfjørð, sum er eitt ta ringasta farvatni í Føroyum, hevði bæði verið ein vánalig íløga og eitt óhugsandi afturstig.

Hvørt íløgan í fast Suðuroyarsamband er ein stór íløgu, velst um eyga, ið sær. Kostnaðurin av føstum Suðuroyarsambandi verður mettur at verða niðanfyri 2 mia. kr. Til samanberinger kann nevnast, at niðurskurðurin í blokkstuðulinum higartil hevur eitt virði á uml. 2,5 mia. kr.

**Hvalbiarbergholið**

Sum tað so mangan er ávíst, er Hvalba ein av framsóknastu vinnulívsbygdum í landinum. Sum støðan er, ber ikki til hjá teimum akførum, sum í dag eru vanlig, at koyra gjøgnum Hvalbiarergholið, eins og tað ikki ber til at halda ferðslu lógini, tá koyrt verður gjøgnum bergholið, sum heldur ikki lýkur tíðarinnar trygdarkrøv.

Stytsta leið úr Sandoy til Suðuroyar er til Hvalbiar. Ein dagføring av farleiðina millum Hvalba og Trongisvág er tí ein liður í fasta Suðuroyarsambandinum. Vit eiga at fara undir dagføringina av Hvalbiarbergholinum skjótast tilber, soleiðis at vit kunnu gagnnýta hendan partin av Suðuroyarsam-bandinum beinan vegin.

Vit mugu minnast til, at skal peningur verða til almenna um- og fyrisiting, skúlaverk, heilsuverk og eldraøkið, er neyðugt at skapa vinnulívinum í primervinnuøkjum sum Hvalba góðar karmar.

**Samandráttur**

Ábøtur og íløgur í Sandoynni og Suðuroynni er ikki ein spurningur um lokalpolitikk. Talan er um landafrøðiligt samhaldsfesti, heildini og framtíðini til frama.

# Brúka tín rætt



Val

PETUR Í GONG
Tjóðveldi
www.tjodveldi.fo/petur

Vel ein mann á ting, ið verjir tíni rættindi sum brúkari.

Stundin er komin, at vit øll fáa okkara sjálvsøgdu rættindi.

Øll eru vit brúkarar. Høgur sum lágur. Ja, sjálvt stjórar og reiðarar eru brúkarar eins og tú og eg.

Men hóast alt samfelagið er grundað á, at marknaðarkreftirnar stýra okkara lívi og øllum búskapinum, er einki gjørt fyri at tryggja sær, at hetta kann fara fram á ein hátt, ið tryggjar tørv og rættindi hjá tí veikara partin í spælinum, nevnliga brúkaranum.

Henda ójavnvág, har brúkarin altíð endar sum tann lítli forsmáddi taparin mótvegis sterkari og vælskipaðari vinnu, má beinast burtur alt fyri alt. Tað ber ikki til at grunda eitt samfelag á so ójøvn lutføll millum týdningarmestu aktørarnar í einum kapitalistiskum fólkaræði.

Tí er neyðugt at gera sær greitt, at skulu vit lata marknaðarkreftirnar ráða, og skulu vit framhaldandi hava álit á mótsøgnini um eina rættvísa kapitalismu, mugu vit geva okkum sjálvum vápn til sjálvverju.

Vel tí tíni rættindi sum brúkari, vel Petur í Gong!

Við ynskjum um eitt gott val fyri alt Føroya fólk.